

## Yvirvaksnir kalvar

Í fjør heyst fekk norðmaðurin Tom Richard Kristiansen ein velduga stóran kalva í gørnum sínum. Norðmenn siga, at hetta er størsti kalvi, sum veiddur er í norskum sjógvi. Men spurningurin er, um kalvin, sum føroyski skiparin Hjalgrím Vestergaard fekk við Skjøtninberg á sinni, ikki var uppaftur størri. Kalvin hjá Tom Richard vigaði heili 629 pund, sum er 49 pund meira enn gamla metið, sum var 580 pund. Hann varð máldur at vera tríggjar metrar langur og ein metur breiður. Ein føroyskur skipari í Noregi, Hjalgrím Vestergaard av Tvøroyri, fekk ein velduga stóran kalva í norskum sjógvi í 2001. Á tí eina túrinum fingu teir ein kalva, sum var 2,85 metrar langur, 1,36 breiður og 50 sentimetrar tjúkkur. Teir skóru upp í seks kurvar av flaki - og haraftrat varð nógv koyrt burtur, sigst.

# mgang í ódnarveðrinum

*- Andlitið var sum eitt stórt egg at føla uppeftir. Eg hovnaði uppundir høgra eyga, sum at enda var heilt afturlatið, tvørtur um nøsina og yvir í vinstra eyga – og munnurin hekk skeivur. Andlitið blánaði heilt niður í barkakílan høgrumegin, sigur Anfinn Kallsberg*



og eg hevði onga pínu at tosa um. Eg kann siga, at eg lítla og onga pínu hevði seinni heldur.

Anfinn og Berghild eiga tríggjar synir, og tað var Kári, sum koyrdi hann til hús hetta kvøldið.

- Konan og allir tríggir synirnir vóru heima hjá okkum beinanvegin. Ein sjúkrasystir og svigarinda, sum býr her í bygdini, var í fyrstani í iva um, hvørt eg hevði fingið heilaskjálvta. Hinvegin fekk eg vikað kjálkabein og munn, og hon sá, at her var ikki brot.

Veðrið var so ringt hetta kvøldið, at vegurin millum Viðareiði og Klaksvík var stongdur. Tí bar ikki til hjá Anfinni at sleppa á skaðastovuna í Klaksvík til kanningar.

- Eg hevði tað hampiligt eftir umstøðunum, men kortini var eg so mikið illa fyri eftir viðferðina, at eg hevði í hvussu er ikki farið útaftur hetta kvøldið.

### Einki brot

Fríggjamorgun, sum hendingin fór fram hóskvøldið, fór Anfinn á sjúkrahúsið í Klaksvík, men har varð staðfest, at einki brot var nakrastaðni.

- Eg hevði brotið okkurt pettið úr tveimum tonnum, og eg føldi eisini tenninar ógvuliga eymar og kanska trýstar eitt sindur inn. Týsdagin í vikuni eftir var eg hjá tannlækna, og her vísti tað seg, at tríggjar tenn vóru loysnaðar í høgru síðu í yvirmunninum. Hesar eru nú undir eftirliti av tannlæknanum.

Anfinn sigur, at serliga høgra síða av andlitinum hovnaði ógvuliga skjótt og nógv eftir stoytin.

- Ja, eg vil siga, at andlitið var sum eitt stórt egg at føla uppeftir. Eg hovnaði uppundir høgra eyga, sum at enda var heilt afturlatið, tvørtur um nøsina og yvir í vinstra eyga – og munnurin hekk skeivur. Tá ið ringast var, var høgra eyga hovið, blátt og afturlatið, og vinstra eygað var eisini blánað. Andlitið blánaði heilt niður í barkakílan høgrumegin. Eg haldi, at blóðsamlingarnar fordeildu seg væl kring um andlitið, leggur hann aftrat.

Men líka so skjótt, sum andlitið hovnaði, fall tað eisini niðuraftur.

- Eg haldi, at hetta rættaði seg lutfalsliga skjótt aftur, og teir næstu dagarnar sást dagamunur, sum hann tekur til. Skjótt fekk eg høgra eygað uppaftur, eins og munnurin kom upp á pláss aftur.

### Feyk langt

Anfinn sigur, at hann hevur verið á staðnum aftur, har skaðin hendi hetta herviliga illveðurskvøld.

- Eg síggi, at eg eri fokin meira enn 10 metrar gjøgnum luftina. Um beinini komu niður á í hesi viðferðini ella ikki, dugi eg ikki at siga, men eg hevði í hvussu er einki sum helst stýr á kroppinum hesa løtu. Ei heldur fekk eg tikið fyri meg, sum eg fór sendandi.

Hann sigur, at hvirlan, sum tók hann hetta kvøldið, hevði eina øgiliga megi og undarliga atferð.

- Vit plaga at siga, at landnyrðingurin líka sum fer uppfyri bakkan eysturi í Bergi, vit rópa, men tað gjørdi hann ikki á sama hátt hetta kvøldið. Hvirlurnar kastaðu sær líka sum í allar ættir og hendan, sum tók meg, vendi líka sum aftur við somu øði.

Hetta kvøldið, sum hendingin fór fram, tørnaði Anfinn inn um 22-30-tíðina, og tað var bevíst, sum hann tekur til.

- Vit hildu ikki, at eg hevði nakrar innaru bløðingar, men ein ávísur ivi var sum nevnt um heilaskjálvta. Tí varð hildið vera rættast ikki at fara til songar ov stutt eftir skaðan fyri at síggja, hvussu hetta nú tók seg upp.

Leygardagin, sum illveðrið herjaði hósdagin, var fyrsti tingfundur eftir løgtingsvalið, og tá boðaði Anfinn í brævi tinginum frá, at hann ikki kundi møta vegna skaða.

- Eg kundi sikkurt farið til Havnar hendan dagin, men eg valdi ikki at fara, tí eg var simpulthen ókennuligur. Fólk høvdu øtast, leggur hann aftrat.

### Størri virðing

Anfinn sigur, at hann hevur altíð havt stóra virðing fyri veðri og vindi, og henda virðing er ikki vorðin minni eftir hesa hending.

- Eg havi ongantíð upplivað slíkt áður – ella nakað, sum líkist hesum, og hetta skal upplivast fyri at trúgva, at tað er satt. Hevði onkur fortalt mær, at slíkt kundi henda, hevði eg næstan sagt, at tað var kolasvørt lygn. Men eg havi fingið annað at síggja, sigur Anfinn Kallsberg, sum tíbetur ikki hevur fingið varandi mein av hendingini.







*Kona Anfinn, Berghild, tók myndir av andlitinum á manninum í allari gongdini. Tá ið skaðin hendi, var vegurin millum Viðareiði og Klaksvík stongdur, og tí slapst ikki av bygdini og á skaðastovuna*